– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Hugnalig hús við Norðskála

**Húsini liggja sera væl fyri á Mýruvegi mitt í bygdini**









## Fyrsta fatanin

Fyrsta fatinum, tá tú koyrir inn í friðaligu gøtuna, er at her er talan um eini hugnalig hús frá áttatiárunum,ið standa væl fyri mitt í bygdini og tætt er til allar hentleikar.

## Húsini

Talan er um eini stór og rúmlig hús, sum tú kanst flyta inn í uttan at gera nakað størvegis. Hvítvørurnar í køkinum eru nýggjar og nýtt gólv er lagt á gongd, stovu og køk. Stílurin er 80´ara stílur, men ynskir tú eini meira nýmótans hús og ert fittur í hondunum, eru hetta tey røttu húsini. Tað er bert hugflogið, sum setur mørk. Húsini eru umgyrd av urtagarði og giring er kring húsini.

Húsini eru innrættað á henda hátt – gongd - trappa upp til wc og kamar, haðani trappa upp til gongd, køk og stóra stovu , og trappa niður til 2 kømur, hjúnarúm, baðirúm, kjallararúm/fýrrúm og krúpikjallara.
Eisini er eitt stórt óinrættað ovasta loft.

## Hjallur

Til húsini hoyrir ein hjallur

## Ljós og luft

Húsini standa væl fyri í friðarligum og barnavinarligum umhvørvi,við endan av blindum vegi í góðum grannalagið. Har er veðurgott og góður sólargangur.
Og vakurt er útsýnið yvir Sundalagið.

| | |
|---|---|
| **Bústaður** | Mýruvegur, Norðskáli |
| **Byggiár** | 1983 |
| **Hæddir** | 3 |
| **Gólvvídd** | 179 m² |
| **Grundøki** | 752 m² |
| **Bilhús** | Ja |





PF inni
Niels Finsensgøta 37
Postboks 364
FO-110 Tórshavn
Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**